## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá ið kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**NINNA M. THOMSEN**
**Tvøroyri**

lá sjúk, andaðist og fór til gravar.
Eina serstaka tøkk veita vit Suðuroyar Sjúkrahúsi og starvsfólkunum har fyri hjálpsemi og tolni.
Tøkk til prest, sangarar og kirkjutænarar, vinir og tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Vinarlig heilsan*
**Anna Kirstin, Bjarni og Tummas**

# Ferðsluátak í Havnini

FERÐSLUÁTAK
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*



Seinnapartin fríggjadagin hevði løgreglan í Havn eitt ferðsluátak á ymsum vegastrekkjum í Havnini. 13 mál vórðu skrivað í ferð, eitt fyri fartelefon og eitt fyri vantandi trygdarbeltið.

Sunnudagin beint eftir middag vórðu ferðmátingar gjørdar í Kaldbaksbotni. Har vórðu fýra bilar tiknir fyri ferð. Teir koyrdu allir yvir 100 km/t, og tann, sum koyrdi skjótast koyrdi 143 km/t.

ífylla

# Fløsku í høvdið

HARÐSKAPUR
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Leygarnáttina fekk ein maður eina fløsku í høvdið uttanfyri Kaggan í Havn. Hann varð koyrdur á skaðastovuna, har hann fekk pentur í oyrað og í vinstru síðu av hálsinum.

Beint áðrenn fekk løgreglan fráboðan um, at ein ungur drongur, hevði sligið ein annan í andlitið niðri í býnum. Talan var um fleiri persónar, sum lupu á ein annan, sum fekk skoynur í andlitið umframt at onkur tonn var loysnað.

### Ferðsluóhapp

Trý korter til fimm somu nátt var eitt ferðsluóhapp uttanfyri Mimir. Ein bilur, sum kom koyrandi frá Sjúrðargøtu, breyt treytaleysu víkiskylduna, og koyrdi útfyri ein hýruvogn, sum kom koyrandi oman eftir Varðagøtu.

Hýruvognsførarin var koyrdur á skaðastovuna við onkrum smásnuddum.

Løgreglan upplýsir, at báðir bilarnir fóru illa av óhappinum.

### Brotnir rútar

Fleiri rútar í Tilhaldinum vórðu knústir um vikuskiftið. Løgreglan kannar nú málið, og talan er um fleiri rútar, sum venda oman ímóti Grasagarði á vestaru síðuni av Tilhaldinum.

Sunnudagin fekk løgreglan fráboðan um, at innbrot hevði verið í Argja skúla. Gerningsmenninir høvdu tikið ein pengakassa frá skrivstovuni. Kriminaldeildin arbeiðir nú víðari við málinum.






# Innbrot umborð á Enniberg

INNBROT
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið beint áðrenn midnátt fekk løgreglan í Havn boð um, at innbrot hevði verið umborð á Ennibergi, sum liggur á Tórshavnar Skipasmiðju.

Fimm dreingir um 14-15 ára aldur vóru handtiknir við stolnum lutum uppi á sær.

Tað vísti seg, at tveir av teimum høvdu verið umborð og tikið telduspøl og annað.

Dreingirnir verða tiknir inn til avhoyringar og sum vanligt er, kemur Barnaverndin eisini uppí málið






atlantic.fo | kall.fo | mmr.fo | gransking.fo | tunnil.fo | biblian.fo | gjogv.fo | sansir.fo | bitland.fo

Henny á Líknargøtu, samskipari á Kalli

## "Heimasíðan frá Sansum er ein tann mest framkomna í Føroyum"

Heimasíðan frá Sansum er ein tann týdningarmesti samskiftismiðilin millum okkum og kundarnar. Tí vóru krøvini til heimasíðuskipanina sera stór. Á síðuni kanst tú keypa í okkara nethandli, og okkara kundar kunnu keypa talutíð við gjaldkorti. Við at logga á kunnu kundarnir síggja nær og hvønn, tey hava tosað við, og hvussu leingi tey hava tosað. Eisini ber til at stovna og umsita sínar teldupostbústaðir.
Av og á eru spennandi kappingar. Í løtuni ber til at velja, hvør mynd skal á nýggju talutíðarkortini.

Tað hevur verið ein treyt, at heimasíðuskipanin skuldi vera væl uppbygd og løtt at læra og brúka, og at sniðið á síðuni skuldi vera dámligt. Vit mugu ásanna, at treytin er hildin. Tað er gott at samstarva við eitt virki, sum hevur egna heimasíðuskipan og forritarar umframt tekst- og grafikkfólk. Fyrimunurin við at gera alt á sama staði er, at vit fáa eina heimasíðu, ið er skræddaraseymað til okkara tørv. Úrslitið er ein heimasíðubygnaður, ið er greiður og hevur snið og tekst, ið bera boðskapin væl fram. Hetta ger tað munandi lættari hjá mær at dagføra heimasíðuna.

SANSIR

Tinghúsvegur 47 | Tel 355 355 | Faks 355 350 | www.sansir.fo | info@sansir.fo